Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Eyðgunn Samuelsen, løgtingsmaður

Svarari: Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur, landsstýrismaður í almannamálum

Evni: Nýggja heimið í Reynstúni

Spurningar:

1. Hvussu langt er arbeiðið komið við at byggja nýtt heim til fólk við menningartarni og fjølbreki (húsfólkini á Eirargarði) í Reynstúni á Argjum?
2. Nær verður heimið í Reynstúni liðugt?
3. Hvat er gjørt av ábótum á núverandi Eirargarði 14 og 16, og hvat verður gjørt, meðan bíðað verður eftir nýggja heiminum í Reynstúni?

Viðmerkingar:
Í frágreiðing løgmans á ólavsøku verður nýggja heimið í Reynstúni á Argjum nevnt sum ein ætlan, men einki verður sagt um, hvussu tað líður við arbeiðinum.[1] Nógvir vardir bústaðir eru í vánaligum standi og eru ótíðarhóskandi.
Tann 29. mars 2019 varð lógaruppskot lagt fyri Løgtingið um at byggja nýtt heim í Reynstúni. Skipanaruppskot og tíðarætlan vóru við í uppskotinum og eftir ætlan skuldi heimið taka 24 mánaðir at byggja og standa liðugt í 2022. Uppskotið fall burtur, tá tingið fór heim.
Bygningarnir Eirargarður 14 og 16 vórðu bygdir í 1970'unum og eru í ringum standi og ótíðarhóskandi í dag. Ætlanin var at gera ymsar ábøtur á Eirargarð 14 og 16, meðan bíðað varð eftir nýggja heiminum. Hetta framgongur eisini av lógaruppskotinum frá mars 2020 um dagføring av vardum bústøðum.
Eisini er tað týdningarmikið hjá húsfólki, avvarðandi og starvsfólkum at vita, um ella nær tey kunnu vænta sær eitt nýtt heim og arbeiðspláss. Tí verður hesin fyrispurningur settur.

Á Løgtingi, 19. august 2021

Eyðgunn Samuelsen

[1] Frágreiðing løgmans á ólavsøku 2021 – s. 65